

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 11 - 2012

# BP sinnað at rinda risastórt endurgjald

BP hevði ábyrgdina av oljupallinum Deepwater Horizon, sum fórst í apríl í 2010 við tí úrsliti, at olja fossaði úr einum brunni á 1.600 metra dýpi. Umframt ta ovurstóru dálkingina kravdi vanlukkan við Deepwater Horizon 11 mannalív. Vil enda málið Felagið hevur ligið í stríði við myndugleikarnar í USA og øðrum londum við Meksikoflógva um, hvør hevði ábyrgdina av dálkingini og avleiðingunum av henni. Men nú sigur ein ónevnd kelda, at BP er til reiðar at rinda milliardaupphædd í endurgjaldi, og at talan er um størsta endurgjaldið í amerikanskari søgu. Er hetta rætt, so er talið í hvussu er oman fyri 1,3 milliard dollarar, sum heilivágfyritøkan Pfizer rindaði í endurgjaldi í 2009. Hvørki BP ella amerikanska løgmálaráðið vil gera viðmerkingar til tíðindini um endurgjaldið. Summar keldur siga, at BP fer at kunngera seinni í dag, at felagið átekur sær ábyrgdina av tí, sum hendi, og at tað verður gjørt fyri at sleppa undan fleiri rættarmálum. Tað et kortini ikki heilt greitt, júst hvat tað er, sum BP er sinnað at átaka sær ábyrgdina av. Oljurisin BP hevur nú játtað at rinda eitt metstórt endurgjald fyri ta stóru dálkingarvanlukkuna í Meksikoflógva um summarið í 2010. Tað siga vælvitandi keldur, sum hava kunnleika til málið ímillum amerikanska løgmálaráðið og BP, við tíðindastovuna Reuters. <http - //mail.tdc.dk/l%20comments>

